**Sernámsdepilin og Økispsykiatriin skipa fyri skeiði 13. og 14. mars 07 um**

# Menningarórógv

**v. Christopher Gillberg, professara**

Í mars mánaði komandi ár fer Sernámsdepilin saman við Økispsykiatriini at skipa fyri skeiði.

Tá fer Christopher Gillberg, barna- og ungdómspsykiatari og heimskendur granskari við Universitetssjúkrahúsið í Gøteborg, at hava skeið, sum er ætlað lærarum, pedagogum, heilsurøktarfrøðingum, læknum, sálarfrøðingum og øðrum, sum hava við børn og ung at gera. Skeiðið fer at snúgva seg um autismu, Asperger Syndrom, ADHD/DAMP og líknandi menningartrupulleikar, ið vanliga hava við sær vantandi sosialt innlit.

Men tað eru ikki bert børn og ung við omanfyri nevndu trupulleikum, ið kunnu hava ilt við at skilja og duga sosialt samskifti. Hesi evni mennast ymiskt hjá ymiskum børnum, og vantandi innlivingarevni í tankar og kenslur hjá øðrum kann gera, at samspælið við umhvørvið miseydnast – børnini/tey ungu kunnu t.d. gerast atferðartrupul.

Fyri at kunna stuðla barnsins menning og fyribyrgja miseydnaðum samskifti, hevur tað stóran týdning at hava vitan um hesi viðurskifti, og Christopher Gillberg er serkønur á økinum.

Skeiðið verður týsdagin og mikudagin 13. og 14. mars 2007, kl. 9 – 16, í hølunum hjá Havnar Róðrarfelag í Álakeri.

Tilmelding fer fram á www.ser-dep.com ella við at ringja til Sernámsdepilin, tlf. 314522 (Eleina Mikkelsen, skrivari).

Tá meldað verður til og goldið verður fyri 1. februar, er gjaldið fyri skeiðið 1.000 kr. Kaffi, te og middagsverður eru íroknað.

Eftir 1. februar er skeiðsgjaldið 1.200 kr. Seinasta freist at melda til er 1. mars.

Goldið verður á girokonto nr. 61891.

Um avboð verður givið eftir 1. mars, verður skeiðsgjaldið ikki afturgoldið.

**Vegna Økispsykiatriina**
Æna Reinert,
sjúkrarøktarfrøðingur

**Vegna Sernámsdepilin**
Hanna Kampmann og Ása Ellefsen,
sálarfrøðingar

**Sernámsdepilin**




# Skeiðsdepilin

FØROYA HANDILSSKÚLI TEKNISKI SKÚLIN

## Projektleiðaraútbúgving

**Projektleiðsla avgerandi amboð á nýmótans arbeiðsplássum**
**Útbúgvingin varar 6 dagar í tíðarskeiðnum frá 5. februar til 17. apríl 2007**

Á flestu stovnum og fyritøkum verða uppgávur í alt størri mun skipaðar sum verkætlanir, tí er umráðandi, at leiðarar og øll lyklastarvsfólk duga projektleiðslu. Leiðarar og lyklastarvsfólk hava ábyrgd av og stýra arbeiðnum, og tað merkir, at førleikin at stovna og leiða verkætlanir fær støðugt størri týdning bæði innan privata og almenna sektorin.

**Í útbúgvingini fært tú m.a. innlit í hesi evni:**

- Hvat er góð projektleiðsla og hvussu verði eg ein góður projektleiðari?
- Projektleiðaraleikluturin frá byrjan til enda
- Hvussu velji eg tað rætta projektstýringsmodellið?
- Amboð hjá einum projektleiðara
- Fellur í teimum ymisku projektstigunum og hvussu ein sleppur undan hesum
- Gerð av projektætlan við virksemisyvirliti, tilfeingisyvirliti og tíðarætlan
- Hvussu tú skapar motivatión og áhuga, tá ið tú skalt byrja eitt projekt, og hvussu tú samansetur og mennir ein projektbólk

| | | |
|---|---|---|
| **Modul 1:** | 5. og 6. februar | - Projektbyrjan |
| **Modul 2:** | 8. og 9. mars | - Projektplanlegging |
| **Modul 3:** | 16. og 17. apríl | - Projektfremjing |
| | allar dagar kl. 09.00-16.00 | |

| | |
|---|---|
| **Skeiðleiðari:** | Ísak N. Jacobsen |
| **Kostnaður:** | kr. 10.100,00 íroknað frálæru, tilfar og mat |
| **Tilmelding:** | í seinasta lagi 22. januar 2007 |

Meira um útbúgvingina er á: **www.skeiðsdepilin.fo**, har kanst tú eisini tekna teg til.

Marknagilsvegur 75, Postsmoga 3239, 110 Tórshavn
tel 318813, Fax 313374,
info@skeidsdepilin.fo, www.skeidsdepilin.fo







Hava tit minst til
at goldið
haldaragjaldið
av Føroya besta blaði...!!!

Tórsgøta 1 · tel 34 18 00 · fax 34 18 01
post@sosialurin.fo · www.sosialurin.fo
Sosialurin


## Byggifrøðingur, verkfrøðingur ella arkitektur
# til Tilbúgvingarstovn Føroya

Starv sum byggifrøðingur, verkfrøðingur ella arkitektur á Tilbúgvingarstovni Føroya, innan virkisøkið brunaumsjón, er leyst at søkja. Til rætta fólkið er talan um eitt áhugavert, fakliga krevjandi og persónliga mennandi starv.

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðsuppgávur hjá Brunaumsjón landsins eru m.a. hesar:

- Eftirlit við sløkkiliðum, sløkkiútgerð og tilkallingarskipanum
- Ráðgeving, vegleiðing og undirvísing í brunatrygdarligum viðurskiftum sambært brunalóggávuni
- Brunatøknilig málsviðgerð av fjøltáttaðum byggimálum o.t.
- Rakstrareftirlit við bygningum o.t.
- Loyvisgevandi myndugleiki í sambandi við stovnseting, flutning, goymslu og nýtslu av eldfimum og spreingikvæmum evnum
- Gera uppskot til kunngerðir og vegleiðingar innan brunatrygdarliga økið o.a.

Roknast má við nakað av ferðing millum oyggjarnar og uttanlanda.

**Fakligur førleiki**
Sóknast verður eftir byggifrøðingi, verkfrøðingi ella arkitekti. Ynskiligt er, at umsøkjarar harumframt hava kunnleika til ella royndir innan sløkkilið, brunatøkniliga byggimálsviðgerð ella hægri serútbúgving innan brunatøkni.

Tann, ið settur verður, má rokna við eftirútbúgving innan- og uttanlands á serøkjum sum brunatrygd, sløkking og bjarging.

Dentur verður lagdur á góðar persónligar eginleikar, at setti persónurin er fyrikomandi, hevur góð samstarvsevni, dugir at skipa sítt arbeiðsøki og at taka sjálvstøðugar avgerðir.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Tænastustaðurin er á skrivstovuni í Tórshavn.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda til Tilbúgvingarstovn Føroya, Tinghúsvegi 64 Tórshavn og skulu vera skrivstovuni í hendi innan 5. februar 2007. Brævbjálvin eigur at merkjast »starv á Brunaumsjón landsins«.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Peturi Olsen, deildarstjóra á tlf. 35 66 10 ella 21 50 46. Teldupostur: plo@brl.fo